Tannlæknastova
Tórshavnar kommunu
Tórsgøtu 23 · FO-100 Tórshavn
tlf. 302525 · teldupostur: tann@torshavn.fo
Heimasíða: www.torshavn.fo
Opið er mánadag-hósdag kl. 8-15 · fríggjadag kl. 8-14

Kollafjarðar Tannlæknastova
Kollafjarðar skúli · FO-410 Kollafirði
tlf. 302556 ella 302525 · teldupostur: tann@torshavn.fo
Opið er mánadag-mikudag kl. 8-15

Sertannlæknastovan
Tinghúsvegi 53 · FO-100 Tórshavn
tlf. 311510 · fax 316526
Opið er mána-, týs- og hósdag kl. 8-16
mikudag kl. 8-17 · fríggjadag kl. 8-12

Átroðkandi viðgerð
Tørvar bráðfeingishjálp eftir vanliga arbeiðstíð, kunnu tit ringja til tlf. 302525, har fáa tit gjøllari boð.

Tannlæknastjóri: Sigrid Arge
Sertannlækni: Bergtóra Hanusardóttir

Hava tit okkurt at spyrja um viðvíkjandi tænastuni hjá barnatannrøktini, eru tit vælkomin at tosa við okkum.

Barnatannrøktin arbeiðir fyri
- At børnini varðveita sterkar og frískar tenn alt lívið
- At børnini kenna seg trygg hjá tannlækna
- At børnini kunnu taka ábyrgdina av egnari tannheilsu

Barnatannrøktin

Tórsgøta 23
FO-100 Tórshavn
Tel 30 25 25
tann@torshavn.fo

Mánadag-hósdag 8-15
Fríggjadag 8-14

Tórshavnar kommuna

Postsmoga 32
FO-110 Tórshavn
Tel 30 20 10
Fax 30 20 11
torshavn@torshavn.fo
www.torshavn.fo

Mánadag-fríggjadag 9-16

Barnatannrøktin

2010

Tórshavnar kommuna

Tannlæknastovan
vegleiðir og hjálpir

Tannlæknastova Tórshavnar kommunu bjóðar øllum børnum og ungum frá 0 til 16 ár í Tórshavnar kommunu alla neyðuga tannrøkt.

Børn frá 0 ár til 16 ár
1. januar 2010 vóru 4.768 børn í aldrinum frá 0 ár til 16 ár í Tórshavnar kommunu.

Smábørn upp til 6 ár
Børnini koma til kanningar fyrstu ferð, tá tey eru tvey ára gomul.

Síðani koma tey regluliga, og minst eina ferð um árið, til kanningar.

Skúlabørn
Skúlabørn koma eisini regluliga, og minst eina ferð um árið, til kanningar.

Frá 1. flokki koma næmingarnar til kanningar og møguliga viðgerðir á tannlæknastovuni eftir tørvi, tó minst eina ferð um árið. Heimið fær boð, tá næmingurin skal møta.

Næmingarnir í 1.- 5. flokki fáa skriv, at hava heim við, hvussu støðan er, tá tey hava verið til kanningar.

Næmingarnir verða lærdir at busta tenn og skulu tí hava tannbust við, hvørja ferð tey koma til tannlækna. Starvsfólk av tannlæknastovuni koma javnan út á skúlar, at geva frálæru í tannrøkt.

Tannrætting
Sertannlækni í tannrætting kannar øll børnini í 5. flokki. Í hesum sambandi verður stór røntgenmynd tikin. Myndin vísir, um tenn og andlit búnast, sum tey eiga. Sertannlæknin metir um, um tenninar skulu rættast, og nær viðgerðin skal byrja. Tannrættingin er ókeypis, men treytað av, at tenninar verða væl røktar. Umleið fjórða hvørjum barni tørvar tannrætting.

Tannskaðar
Barnatannrøktin viðger ókeypis allan tannskaða, til tey ungu fylla 16 ár.

Í summum førum er neyðugt at bíða endaliga at viðgera skaða til 20 ára aldur ella seinni. Tað er tí umráðandi, at hava eina trygging, ið umfatar tannskaða. Skaðin skal verða fráboðaður tryggingini beinanveg. Tannlæknin hjálpir at fylla út skjølini.

16 ár, hvat hendir so?
Tað 16. árið er tað seinasta, tey ungu hoyra til barnatannrøktina.

Fyri at lætta um skiftið frá kommunalu tannrøktini til privatan tannlækna, geva vit teimum ungu møguleika at velja sær ein tannlækna. Vit geva tannlæknanum boð, og hann boðsendir so teimum ungu til kanning.

Góð ráð

Busta tenn tvær ferðir um dagin
Um tú bustar tenninar væl tvær ferðir dagliga við fluortannkremi og minnist til tanntráðin, so hevur tú góðar tenn alt lívið. Eini góð ráð: tað styrkir tenninar, um tú ikki skolar tannkremið av tonnunum, tá ið liðugt er at busta. Reinar tenn brenna ikki.

Tanntráður sleppur, har tannbustin noyðist at gevast
Tannbustin sleppur ikki inn millum tenninar. Tí er neyðugt at brúka tanntráð eina ferð um dagin, alt lívið.

Allar tenn skulu bustast
Fyri at tenninar ikki skulu brenna, skulu allar tenn verða bustaðar – eisini fyrsta tonnin. Vani vinnur.

Hjálpið barninum
Børn hava ikki neyðuga handalagið at busta tenn, fyrr enn tey eru 10-12 ára gomul. Tí eiga foreldur at busta tenninar hjá barninum dagliga.

Tú fært bara ein munn, ansa eftir honum
Góðir matar- og drekkivanar og vælbustaðar tenn tryggja góðar umstøður hjá tonnum og tannkjøti. Far væl við munninum, so fer hann væl við tær. Lærið børnini at fara væl við tonnunum, so gevur tú teimum eina gávu fyri lívið.

Tannlæknin er nokk so fittur
Tað er ein ring byrjan at hava tannapínu fyrstu ferð, tú ert hjá tannlækna. Hjálpið barninum at fáa jaligar upplivingar hjá tannlæknanum. Eingi hol er ein góð byrjan.